## Nýggj tinglýsing

Innlendismálaráðið biður nu KT-veitarar geva tilboð upp á eina nýggja tinglýsingarskipan til Tinglýsingarstovuna. Endamálið er at útvega og íverkseta eina nýggja høvuðsskipan til at fyrisita tinglýsing. Innlendismálaráðið hevur gjørt av, hvørji krøv skulu setast nýggju skipanini, og fríggjadagin verður kunnandi fundur fyri KT-veitarum um ætlanina. Fundurin verður í Skibsted Pakkhúsi, har Innlendismálaráðið heldur til.

## Thor fer yvirum

Partafelagið Thor í Hósvík víðkar nú sítt virksemi. Higartil hevur felagið fingist við frálandavinmnu og fiskiskap, men nú hevur felagið keypt seg inn í partafelagið O.C. Joensen, sum eigur rækjuvirkið og skeljavirkið á Oyri umframt skeljatrolaran Norðheim og gágguskipið Varðborg.. Thor hevur keypt 60 prosent av partapeninginum frá tveimum eigarum í O.C. Holding, sum eigur 75 prosent av partapeninginum í O.C. Joensen.

# Øll yvir ein kamb



*- Tað er gott at kundarnir koma aftur og aftur. Tað má vera tí at teir eru nøgdir við klippingina, sigur Eigil Lyngsø*

**Ein myrkan novemberdag í 1957 fór Djóni Thomsen at klippa sær. Tá visti hann ikki, at hann samstundis var fyrsti føroyski kundin hjá tí 21 ára gamla dananum, Eigil Lyngsø. Í morgun kl. 9 var 69 ára gamli Djóni enn einaferð og klipti sær hjá Lyngsø. Hesaferð verður hann kortini millum teir seinastu kundarnar hjá Lyngsø: Í næstu viku gevst hann nevniliga sum barberur!**

**Hárskeri**
*Snorri Brend*

**Havn:** - Nei, eg fari nokk ikki at ganga við langum hári, fyri tað um Lyngsø gevst at klippa. Onkur annar man duga at klippa eins væl og hann, sigur Djóni Thomsen.

Trúfast hava hann og mangir aðrir við honum havt sína føstu gongd í Salong Lyngsø undir Hotel Hafnia.

Nú hevur eigarin av bygninginum tørv á hesum hølinum eisini, og tí gevst hann við yrki sínum sum hárskeri sløk fimmti ár eftir at hann setti fót sín á føroyska jørð.

Seinasti kundin verður eftir ætlan kliptur sjálvan tollaksmessudag!

- Hetta hevur verið ein góð tíð. Fólk eru komin aftur og aftur, og tað má væl vera besta tekin um, at tey hava verið væl klipt, sigur tann nú 70 ára gamli, Eigil Lyngsø.

**Byrjaði ein mánadag**

Sjálvur minnist Djóni ikki tá hann, sum gott 20 ára gamal á fyrsti sinni fór at klippa sær hjá Eigili.

Men í morgun kundi Eigil upplýsa honum at hetta var 11. november í tí Harrans árinum 1957. Einki verður kortini sagt um, hvussu veðrið var, men hetta var í øllum førum ein mánadagur!

- Jú, hann var mín fyrsti kundi, tá eg arbeiddi í salongini undir Sjómansheiminum, leggur Eigil aftrat.

Fyri Djóna var hetta helst ein so mikið góð uppliving – og hann var so væl nøgdur við lokna arbeiðið - at hann hevur fylgt Eigili øll hesi sløk fimmti árini, eisini tá hesin byrjaði fyri seg sjálvan undir Hafnia í 1968.

> ”Her skal ein vera hálvur psykologur, ein má hava gott minni, og vita, hvat ein skal siga, og ikki minst, nær ein skal siga tað.

- Eg trúgvi ikki at eg havi verið hjá nøkrum øðrum barberi síðani tá – um vit líka síggja burtur frá verdóttur míni.

- Men, - tað hevði helst verið nakað dýrt at fingið hana higar at klipt mær hvørja ferð, tað var neyðugt. Hon býr nevniliga í Grønlandi!, sigur hann við einum brosi.

**Klippir sum ein ynskir**

“Traditionen tro” var Djóni aftur og klipti sær hjá Eigili í morgun, nú bert 13 dagar eru til jólar. Kl. 9 hevði hann fingið tíð, og hann møtti stundisliga, eisini til heiður fyri tíðindatænastuna.

- Eg skal siga sum er. Mær hevur altíð dámt at komið her, frá fyrsta degi. Eigil hann klippir væl, og klippir altíð soleiðis sum eg vil hava tað, sigur Djóni.

Kostnaðarstøðið í landinum hevur eisini havt sína ávirkan á prísin fyri eini klipping. Í 1957 kostaði tað einans 3 kr. at klippa sær, meðan tú í dag rindar væl omanfyri 100 kr. fyri sama arbeiðið.

Fyri Djóna hevur hetta verið væl farin peningur. Tað hevur altíð verið bæði hugnaligt og gott at koma í salongina til eitt gott prát.

- Vit hava tosað um nógv ymisk viðurskifti. Ofta um veður og vind. Onkutíð eitt sindur um fótbólt, men annars hava vit ofta minst aftur á gamlar dagar.

- Fyrr hevði eg áhuga fyri fótbólti, men nú dámar mær væl at hyggja eftir skíðítróttir í sjónvarpinum. Tað kann ein eisini tosa við Eigil um, greiðir Djóni frá.

- Ja, brýtur Eigil hann